# BÓKASÍÐAN

bøkur, bøkur, bøkur…



Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

## *Varðin 2005* komin

Innihaldið í 72. bindi av *Varðanum*, sum júst er komið, er eins og árini frammanundan eitt fjølbroytt úrval av søgum, frásagnum, yrkingum og bókaummælum.

Tummas Lenvig hevur umsett áhugaverda grein um føroyskt mál, sum stóð í Dimmalætting fyri meiri enn 100 árum síðani. Tað vóru Jógvan Poulsen, lærari, Jakob Jakobsen, máfrøðingur og Jóannes Patursson, bóndi, sum skrivaðu.

Povl Skårup skrivar um Thomas Jacobsen (Tarnovius). Ein stuttsøga er eftir Prosper Merimèe og framhald av stuttsøguni "Fjáltrandi kenslur" eftir Steffan Zweig.

Eisini er seinasta greinin um tey stóru seglskipini við í *Varðanum 2005*. Freydis Poulsen skrivar um Norðaskála Søgu, Eivind Weihe hevur grein um Skipan fyri tingafaratoll, og Egon Hansen skrivar um Nólsoyar vita og fólkið har. Turið Sigurðardóttir hevur grein um tjóðarskald Finlands, Runeberg, um rivjabýirnir hjá Evu Strøm og harafturat tvey bókaummæli: um yrkingasavnið *Ariel* eftir Alexander Kristiansen og um gomlu bókina hjá Lucasi Debes um Føroyar, sum nú aftur er komin á týskum máli. Eisini ummælir Hanus A. Samuelsen bókina *Far fram á Torg* eftir Guðruna Gaard.

At enda er ein heilsan til Emil Thomsen, sum fylti 90 ár 27. november.

Í sambandi við útgávuna fyri 2005 hevur Varðin fingið nýggja heimasíðu, www.vardin.net, har eisini innihaldsyvirlit er yvir allar Varðarnar, sum eru útkomnir síðani 1921.




# Bøkurnar og eg

**Birgir Kruse, ritstjóri á Føroya Skúlabókagrunni**

*Hvørja bók lesur tú í løtuni?*
- *Saga Eysturoyar* hjá Kristian Osvald Viderø. Lukkutíð hava fólk á Eiði ikki gingið so nógv við slatri, sum aðrastaðni, so har er avmarkað, hvat Viderø hevur fingið burturúr. Keypti bøkurnar hjá Viderø á útsølu herfyri. Hugtakandi univers, tað hjá Viderø. *Glansbílætasamlarnar* hjá Jóanesi Nielsen lesi eg eisini og so allar fakbøkurnar, sum Skúlabókagrunnurin arbeiðir við. Yrkingasøvn lesi eg javnan, og tað er neyvan dagur, eg ikki lesi eina yrking. Nýggja savnið hjá Heðini M. Klein lesi eg beint nú, og so vendi eg altíð aftur til Henrik Nordbrandt og Sálmabókina, har eg haldi Sámal A. Weihe vera serliga spennandi. Mær dámar væl sálmaskaldskap, og í so máta er norski Edvard Hoem eisini eitt gott boð. Hann eigur tekstin til ta fløguna, sum eg oftast man spæla, "Den fattige Gud". Yvirhøvur brúki eg meiri tíð at spæla plátur og fløgur, heldur enn at lesa, tí rokklyrikkur liggur fremst fyri.

*Er tað onkur bók, tú minnist serliga væl?*
- *Outsideren*, sum eg 14 ára gamal las saman við ein floksfelaga, *Løgneren* hjá Martin A. Hansen, sum vit lósu í realskúlanum á Oyrarbakka, *One flew over the cookoo's nest* hjá Ken Kesey og *Down and out in London and Paris* hjá George Orwell, sum vit lósu í Studentaskúlnum, hava allar ligið leingi á og gera tað enn. *Når snerlen blomstrer* hjá Bjarne B. Reuter hevur eisini eitt serligt pláss í einum lærarahjarta og man vera bókin, eg oftast havi lisið. Góðar bøkur, sum eg vendi aftur til og nýti sum fakligar uppslagsbøkur, eru *Ögonvittnet* hjá Anders Ehmark um ein krígsreportara í Afrika, sum aldri sær kríggið, men tó skrivar av fullum huga um tað, og landsmaður hansara Göran Rosenberg, sum í *Tanker om journalistikk* viðger eina røð av evnum m.a. public service. Av fagurbókmentum er *Kaninbjerget* hjá Richard Adams einasta bók, eg havi lisið út í eitt og *Undtagelsen* hjá Christian Jungersen, sum er um happing á arbeiðsplássum, fekk eg nógv burturúr at lesa í fjør.




*Ó – søgur um devulskap sum ljóðbók hevði verið ein frálík jólagáva, tí Carl Johan Jensen man vera millum bestu upplesarar, heldur Birgir Kruse*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

*Hvør var tín fyrsta lesiuppliving?*
- *Tá Antines fangaði seyðatjóvarnar,* sum pápi mín las. Tað gjørdi hann ikki ofta, men hesa minnist eg og eisini hoyggjhúsið á Barnalofti, har eg ikki ivaðist í, at søgan hjá Martin Joensen fór fram. Fyrsta sjálvstøðuga lesiuppliving man vera *Ein Ribbaldur* hjá Eilif Mortansson og Vicke Viking. *Gluggan* las eg eisini á tamb, og eitt íslendsk barnablað, *Æskan*, sum mostir ein floksfelaga plagdi at fáa.

*Hvørja bók vildi tú ynskt, tú hevði lisið?*
- *Fúrstan* hjá Machiavelli og manualin til Adobe Acrobat. Havi ongan áhuga í útinnandi makt og lesi aldri manualar og angri tað altíð. Men ikki gerst við.

*Hvat fær teg at velja tær bøkur, tú lesur?*
- Uppslagsbøkur og álmanakkar við ávísum avmarkaðum evnum, um rokk, film, ella skaldskap, sum eg kann brúka í mínum dagliga arbeiði. Er talan um fagurfrøðiligar bøkur, so velji eg bøkur, sum onkursvegna geva eitt afturljóð, sum klingar av mínum barnaárum, bíbilskt og gamaltestamentligt. Her koma bæði Viderø og Johnny Cash klárt inn.

- Fyri ikki um at tala Carl Jóhan. Hann eigi eg á. Heilt til páskar. Vóni, at rithøvundurin fer at geva *Ó* út sum ljóðbók. Tað hevði givið bókini ta eyka dimensión, sum hon hevur uppiborið, tí rithøvundurin er millum bestu upplesarar. Carl Jóhan sum ljóðbók, tað hevði verið ein góð jólagáva.

## Síðsta bókin um Samson og Roberto

Bókadeildin gevur nú út síðstu bókina í væl umtóktu røðini eftir Ingvar Ambjørnson um tann ógvuliga ljóta hundin Samson og tann listinlærda frensin Roberto, sum saman reka pensjónatið Sjóvargarð, har grevlingurin Greta er pikkolo, og oturin Oda gongur til handa. Bókin hevur heitið *Loyndarmálið hjá Faðir Pietro*, og í hesum partinum verður rættiligt rok, tí lógarinnar langi armur, Ludo Karson, handtekur yrkjaran Gregor, sum er komin á fríggjaraferð at vitja Gretu. Men meira skal til fyri at loysa Gregor úr varðhaldinum enn at tosa um pass og um fría orðið og at siga, at Gregor er gestur á pensjonatinum og yrkjari, sum hevur fingið seks stjørnur fyri sína seinastu bók.

Benny skrivar um talufrælsi og djórarættindi í undirgrundarblaðnum, og italski kokkurin Mario Gastromati, sum ger tað frágera góðu pitsa a la mamma, blandar hylliberjasaft, sum fær Ludo at enda í sjeynda himli. Allan hendan hurlivasan og mangar aðrar ber til at lesa um í hesari sera skemtiligi bókini. Tær báðar fyrru bøkurnar um Samson og Roberto *Arvurin eftir Rin-Tin-Tei farbróður* og *Klandursvættini* komu út í 2004 og 2005, og aftur hesuferð er tað Alexandur Kristiansen, sum týddi úr norskum og Per Dybvig, ið teknaði stuttligu myndirnar.





Eg ynski mær bøkur til jóla
Føroyaprent